# Show FRAMFØRSLA

**Leygardagin 1. okt. kl. 15.00 skipa FUR og Tórshavnar kommuna fyri einari »Show« framførslu um ungdóm í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.**

Til framførsluna koma sjey ung og vaksin, sum dagliga starvast í einum projekti: **www.ditlivditvalg.dk**, har høvuðsendamálið er at fyribyrgja at ung koma á skeiva kós.

Tey fara at viðgera evnir, sum ungdómsidentitetur, rúsevni, harðskap, einsemi, happing, sjálvsvirði, motivatión o.a.

Í hesum sambandi fara tey at greiða frá teirra royndum, og hvussu hetta hevur merkt teirra lív. Tey koma eisini at geva okkum teirra boð upp á, hvussu man kann røkka teimum ungu.

Framførslan er ætlað foreldrum, politikarum, fakfólki, løgreglu og øðrum áhugaðum.

Kostnaðurin fyri »Show« framførsluna er **kr. 150,-** sum verður at gjalda við dyrnar.

# Nantong

– NÚ NÝGGJ MENU –
UM KVØLDIÐ

Sunnudag - hósdag kl. 17-22
Fríggjadag - leygardag kl. 17-23

– DØGURÐA-BUFFÉT –
Mánadag - fríggjadag kl. 11.30-14.30

– Borðbílegging á tel 318698 –

**Nantong**
Tinghúsvegur 8 · tel 318698 - 218668

# UTTANLANDS FLYTING

**hurð til hurð**



**Føroyar → Danmark**
**Danmark → Føroyar**

**TILBOÐ VERÐA GIVIN**

**A.K. TRANSPORT · TEL 58 40 40**

Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk Sosialurin

# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður í Leirvíkar kirkjusókn **týsdagin 8. november 2005.** Valið fer fram í kirkjuni nevnda dag frá kl. **10-12** og **16-18 (20)**.

Valevnislistarnir skulu vera formanninum fyri valstýrinum, Hallgerð Lervig, í hendi í seinasta lagi **11. oktober kl. 19.00**. Valevnini mega vera 6, og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskrivað listan. Høvuðstreytin fyri vælrætti er, at ein og hvør, sum er limur í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 8. november 2005, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 6 limir.

Øll valevnini skulu geva skrivliga váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hava tey ikki sitið í kirkjuráði áður, at tey eru sinnað at undirskriva ta váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta heima 10. og 11. okt, báðar dagar frá kl. 15.00 - 17.00, annars á tlf. 443226.

Leirvík hin 28. september 2005
Valstýrið fyri
**Leirvíkar kirkjusókn**
*Hallgerð Lervig, formaður*

# Til sølu

## Mitsubishi Outlander 4x4



Árg. 11/03 · Sera fínur bilur - sum nýggjur · Aircond. o.a.
**Lagalig fígging**

**Útgjald einans kr. 43.000,- Restina práta vit um**

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING

**Bilfríðkan á Hjalla**

TEL 35 73 00 · FARTEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

# MERKISDAGAR

Við at ringja 809022 kanst tú senda heilsanir við fjarriti, sum er ein vøkur heilsan á snøggum pappíri.

Í dag verða øll fjarrit send móttakaranum við posti.

Nærri fæst at vita á:

**FJARRIT**
Tel 80 90 22

FØROYA TELE
www.tele.fo - tel 30 30 30

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin

# Sjúkrarøktarfrøðingur til E3/E2

Eitt avloysarastarv, vegna barnsburð, á brøk 1,0 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan 1. november 2005 ella eftir avtalu til og við 30. apríl 2006. Møguleiki eru fyri lægri brøkið.

E3 er ein medisinsk deild við í løtuni 5 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi- og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við hug og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjarar:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- Fakligan áhuga innan sergreinirnar

**Vit kunnu bjóðað:**
- Eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- Fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- Positivt tvørfakligt samstarv
- Fakliga menning
- Innleiðslu

**Upplýsingar um størvini** eru at fáa við at ringja til Monicu Brickman, deildarleiðara, telefon 304500, lokal 6012 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo.

**Lønar- og setanartreytir:**
Smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 14. oktober 2005 kl. 12.00. *Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skrivligar umsóknir** merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum, CV, autorisatión, við mælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
att. Una Fagraberg
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Salong Sonja

Salongin er opin aftur frá mánadegnum 3. oktober.

**Salong Sonja**
**Tlf. 266998**